# Handan ræðsluna

**Ótti var evnið, tá næsta agurk-kappingin varð útskrivað. Og við filminum »Beyond Fear« hevði liðið hjá Johan Ivar Venned funnið ein tryggan vinnara**

FILMSKAPPING
*Jákup Mørk*

Har var eingin ivi. Dómsnevndin, sum var sett saman við Ivan Niclasen, Høgna Djurhuus og Bjarna A. Bjarnason, segði seg onga løtu vera í iva. Hóast støðið var rættiliga javnt gott, so hevði liðið handan Beyond Fear av álvara skarað framúr, hildu teir.

### Sprottin úr dreymi

Ein av høvuðsmonnunum - sum eisini var høvuðsleikari í filminum - John Ivar Venned, var sjónliga fegin um heiðurin. Ein heiður, sum kanska fyrst og fremst bygdi á eina ótrúliga søgugongd. Eina søgugongd, har høvuðspersónurin sjálvur válar runt í onkrari dreymaverð, har hann støðugt rennir seg í eina merksiverda veru. Ein hvíttklæddan drong, sum hóast bjarta litin meira er átøkur ímyndini av tí ónda.

Ivaleyst er tað betri at síggja filmin, tá hesin aftur verður vístur í Sjónvarpinum, heldur enn at greina søguna her. Men eftir handanina viðgekk John Ivar, at filmurin sum so hevði sín uppruna í veruleikanum.

- Vit vóru nakrir, sum alt fyri eitt ætlaðu okkum at vera í hesi kappingini. Vit royndu at seta ymisk hugskot saman, men hetta hugskotið fekk ein okkara so, tá hann var til skips. Hann hevði droymt ein dreym, sum hann soleiðis royndi at festa niður, og hann greiddi okkum eisini frá hugskotinum, tá hann var komin í land aftur.

Men at fáa eina slíka surrealistiska søgugongd at sampakka við ein film. Er tað ikki trupult?

- Jú. Og tað var eisini nakað, sum vit arbeiddu nógv við. Vit høvdu jú mest sum hvør sína ímynd av tí, sum hann greiddi frá. Og undir upptøkunum var hann eisini sjálvur við, soleiðis at hann kundi siga, at »hetta var akkurát tað«. Tað hevur verið ein stór avbjóðing, men samstundis øgiliga stuttligt.



*Tað var ein sera fegin vinnari, sum hóskvøldið kom eftir, at hann við høvuðsleiklutinum í stuttfilmi hevði verið við til at vinna Agurk-kappingina*

Tilsamans var talan um heilt nógv fólk, sum tóku lut í filminum. Ikki minst, tí søgan kravdi hópin av statistum, og hesi ganga øll runt í filminum, sum vóru tey púrasta vanligir fótgangarar í miðbýnum í Havnini.

### List er list

John Ivar er kanska betri kendur fyri leiklutin hjá sær í tónleikabólkinum, Synarchy. Men tá vit spyrja hann, hvørt tónleikur og filmsgerð ikki onkursvegna eru lík, svarar hann játtandi.

- Bæði eru jú á sín hátt list. Og fyri tað nógva ræður um at perfektionera tíni avrik. Í so máta eri eg kanska komin longri við tónleikinum, sum eg havi fingist meira við. Men hetta er avgjørt eisini stuttligt.

Og sum so fær hann nú eisini møguleikan at sameina hesi. Høvuðsvinningurin í kappingini var nevnliga eitt upptøkutók, sum er vert einar 25.000 kr. Og longu nú er gjørt av, hvør fyrsta uppgávan við hesum er.

- Vit ætla at gera eina tónleikavideo. Tað er avgjørt nakað, sum tiltalar meg, tí tá ræður um at finna eina javnvág, har tú við myndum kanst greiða frá søguni í einum lagi. So tað verður helst fyrsta verkætlanin í so máta, segði John Ivar at enda.

# Skapa føroyska filmssøgu

**Tað er ein partur av stuttu føroysku filmssøguni, sum verður skrivaður, nú agurk-kappingarnar standa á skránni**

AGURK-KAPPING
*Jákup Mørk*

- Hetta ættarliðið, sum nú tekur lut í filmskappingunum í Sjónvarpinum, hava ein einastandandi møguleika. Tit hava møguleikan at skriva føroyska filmssøgu, tí hon finst mest sum ikki.

Soleiðis málbar Jákup Veihe seg, tá hann sum annar av agurk-monnunum byrjaði kvøldið, tá vinnararnir av filmskappingini skuldu kjósast.

Víðari legði hann eisini dent á, at hóast hetta var ein møguleiki, sum skuldi takast, so var talan samstundis um eina ábyrgd. Eina ábyrgd, sum kravdi nógv av teimum, sum skrivaðu søguna, men sum kortini eisini var ein ábyrgd, sum eigur at takast.

### Jan hevur eina missión

Saman við Jákup Veihe hevur Jan Berg Jørgensen eisini verið maðurin, sum hevur staðið handan agurksendingarnar.

Jan er útbúgvin cand.mag í enskum við hjágrein í filmsog miðlavísind. Í sjálvum sær ein útbúgving, sum er rættiliga sjáldsom fyri ein føroying, og Jan viðgongur eisini, at hetta hevur skundað undir arbeiðið at menna eina filmsmentan í Føroyum.

- Sjálvur visti eg slettis ikki, hvat eg skuldi gera heima í Føroyum, tá eg hevði lokið prógv. Vit fluttu tó heim, og eg fekk so starv í Sjónvarpinum, umframt at eg havi undirvíst nakað í Hoydølum.

- Men tú kanst gott siga, at hevði eina ætlan - ella kanska missión, tá eg flutti heimaftur. Eg vildi fegin vera við til at skapa eina filmsmentan í Føroyum. Eina filmsmentan, sum ikki bara tók støði í popularismu og mainstream. Hóast hesi bæði eisini eru neyðug, so er eisini tørvur á øðrum og meira enn tí.

Og heldur tú teg hava sett hol á tann partin við agurksendingunum, har tit nú tvær ferðir hava skipað fyri kapping?

- Tað haldi eg. Hetta kann í øllum førum vera við til at skunda undir áhugan, og tað er so ein møguleiki hjá teimum, sum hava hug at traðka fram.

### Botnurin og breiddin betrað

Í mun til fyrru kappingina, heldur Jan, at áhugin hesa ferð var væl størri. Fleiri enn 20 filmar tóku lut í kappingini, og tí varð neyðugt at sálda frá, longu áðrenn filmarnir vórðu vístir í sjónvarpinum. Men kortini heldur hann, at støðið ikki er hækkað so heilt nógv.

- Botnstøðið er hækkað nógv. Tað eru fleiri, sum hesa ferð hava flutt seg væl nærri toppinum, men hinvegin er enn eingin, sum veruliga hevur runnið avstað.

Men júst økta botnstøðið og harvið størri breidd. Er tað ikki fortreytin fyri, at vit knappliga fáa eitt gjøgnumbrot?

- Sjálvandi. Og tað fer vónandi eisini at koma. Vit hava í øllum førum ætlanir um at føra projektið enn víðari. Í fyrstu atløgu verður talan um í øllum førum tvær nýggjar kappingar. Onnur verður at gera lýsingarfilmar fyri Ráðið fyri Ferðslutrygd, og hin verður ein kapping við sjónbandsløgum.

- Hartil verður talan ætlandi eisini um ein norðurlendskan filmsskúla í Føroyum komandi summar. Enn eru vit ikki komnir heilt á mál við tí, men ætlanin er so at skipa fyri einum skeiði upp á tvær vikur, har norðurlendskir ungdómar - eisini føroyskir - kunnu fáa vegleiðing frá nøkrum veruligum kapasitetum á økinum. Eitt tiltak, sum vónandi kann geva teimum bestu eitt ordiligt lyft, sigur Jan Berg Jørgensen at enda.

## Tey fremstu

1 Beyond Fear
John Ivar Venned
2 Meod
Hallur Jacobsen, Sigurd Justinussen, Páll Skýlindal, Bartal Læarsson
3 Bókin
Høgni Thomsen





## Virkisleiðari

Av tí at virkisleiðarin á P/F Faroe Seafood í Miðvági fer frá vegna aldur søkir P/F Faroe Seafood eftir virkisleiðara til virkið í Miðvági. Virkisleiðarin skal hava ábyrgd av framleiðslu, rakstri, menning og umsiting av virkinum í Miðvági. Virkisleiðarin myndar virkið úteftur.

P/F Faroe Seafood Miðvági virkar serliga hýsu og upsa. Vørurnar ið virkaðar verða eru á høgum góðskustigi og fevna um m.a. catering- og retail vørur, eins og frystar ídnaðarvørur. Arbeiðið á P/F Faroe Seafood Miðvági fer fram sambært innaneftirlitsskipan, sum er góðkend av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Í 2004 virkaði virkið uml. 4.000 tons av ráváru.

**Uppgávurnar hjá virkisleiðarinum verða m.a.**

- Leiða arbeiðið á P/F Faroe Seafood Miðvági
- Gera dag- og vikuroknskapir
- Gera rakstrarætlan
- Samstarv við søludeild og samskifti við keyparar av vørunum
- Samstarv um keyp av ráváru
- Samstarv við høvuðsleiðslu og aðrar virkisleiðarar

**Ynskiligt er at umsøkjarin hevur hesar førleikar**

- Hóskandi útbúgving á passandi støði
- Kunnleika til og royndir innan framleiðslu av fiski
- Leiðslueginleikar
- Góðan málkunnleika
- Duga væl at samstarva og samskifta

Vit kunnu bjóða eitt arbeiði í mennandi og spennandi umhvørvi við góðum umstøðum. Lønina tosa vit um.

Allar umsøknir verða viðgjørdar í trúnaði. Umsóknarfreistin er 2. januar 2006.

Møguligir umsøkjarar kunna seta seg í samband við:

Faroe Seafood
att: Meinhard Jacobsen ella Símun P. Jacobsen.
Postboks 218
FO-110 Tórshavn, Føroyar
Tel +298 35 55 55
Fax +298 35 55 50

FAROE SEAFOOD